*Góð útlit fyri nýggjari Lopransboring:*

# Avtala klár um at bora í Lopra í januar

*Eftir øllum at døma verður samstarvsavtala undirskrivað í januar millum tey 18 feløgini, sum vilja vera við í eini nýggjari Lopransboring. Sosialurin kann í dag avdúka nøvnini á teimum feløgunum, sum uttan iva vera við*

Miðskeiðis í hesum mánaðinum var fundur í Keypmannahavn um ta ætlaðu Lopransboringina. Á fundinum vóru umboð fyri tey 18 feløgini, sum hava sagt seg vilja vera við til at fíggja eina nýggja boring í Lopra.

Fundurin var í hølunum hjá Danop í Hørsholm, sum stendur fyri verkætlanini.

Arne Rosenkrands Larsen, sum er projektleiðari, sigur Berlingske tidende, at fundurin var væleydnaður, og hann roknar við, at ein avtala verður undirskrivað í januar.

Sosialurin kann annars upplýsa nøvnini á teimum 18 feløgunum, sum vilja vera við í Lopransprojektinum.

Hesi eru Amerada Hess, Amoco Denmark, Arco British, BHP Petroleum, Dansk Olie og Gasproduktion, Enterprise Oil, Fina, Lasmo, Mobil, Norsk Hydro, Phillips, Saga, Shell, Statoil, United Texas, BP, British Gas og Chevron.

jan

## Jógvan Martin Olsen hjálparvenjari, venjari & ungdómsvenjararáðgevi

Fótbóltssamband Føroya hevur gjørt avtalu við Jógvan Martin Olsen, Toftum. Avtalan inniber at Jógvan Martin Olsen er settur sum hjálparvenjari hjá A-landsliðnum, U16 landsliðsvenjari og Ungdómsvenjararáðgevi. Starvið sum ungdómsvenjararáðgevi verður í størst møguligan mun at hava innlit í ungdómsvenjingina í feløgunum.

Jógvan Martin Olsen hevur seinastu tvey árini verið tilknýttur Fótbóltssambandinum sum U16 landsliðsvenjari eins og hann av og á hevur verið avloysari sum hjálparvenjari hjá A-landsliðnum.

Avtalan er galdandi frá 1. desember 1995 til 30. november 1997.

## Bridgekapping 2. jóladag

Bridgekapping verður 2. jóladag í Bridgehúsinum í Havn.

Hetta verður sum ein vanlig parakapping, men við peningavinningum.

Vinnandi parið fær 250 krónur í part, nr. 2 fær 150 krónur í part.

Tað er ikki neyðugt frammanundan at tekna seg til kappingina. Kappingin byrjar kl. 14.

Hini árini hevur luttøkan verið stór til hesa kapping 2. jóladag. Í fjør varð spælt við sjey borð.

Í vetrarkappingini í Bridgehúsinum, har spælt verður hvønn sunnudag, er støðan nú, at Arnbjørn Sivertsen liggur á odda við 114 stigum, og næstur honum eru Arne Mikkelsen og Rói á Rógvu, sum báðir hava 82 stig.


Frá Upplýsingarfelagsskapi Verkamanna

*Vit ynskja limum okkara, skeiðluttakarum, skeiðleiðarum við húski og viðskiftafólki annars, eini góð og hugnalig jól og eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri gott samstarv í skjótt farna ári.*

Nevndin


TIP & VIND 1 X 2

### TIPS-dystir

Vika nr. 52
30.–31. desember

1. Arsenal–Wimbledon
2. Aston Villa–Sheffield W.
3. Blackburn–Tottenham
4. Bolton–Coventry
5. Chelsea–Liverpool
6. Everton–Leeds
7. Manchester U.–Queens P.R.
8. Nottingham–Middlesbrough
9. Southampt.–Manchester C.
10. West Ham–Newcastle
11. Huddersfield–Stoke
12. Sheffield U.–Millwall
13. Sunderland–Birmingham




Frá einan av teimum størstu og mest framkomnu verksmiðjunum í Europa kunnu vit bjóða sjónvørp úr 14" heilt upp í 34" fyri ÓHOYRDAR PRÍSIR

DØMI:
28" sjónvarp v/ stereo, teletext, fjarstýring, 4 hátalarum o.o.
Vanl. prísur 8.800,-

Kontant einans 7.900,-

dm tronic
Sverrisgøta 15 · Box 2125
110 Tórshavn · Tlf. 17497




*Øllum okkara viðskiftafólki ynskja vit eini gleðilig jól og eitt gott og eydnuríkt nýggjár*



P/f Smyril Line


## Brúdleyp & silvurbrúdleyp

Týsdagin 19. des. høvdu hjúnini Knudina og Leivur Joensen á Oyri silvurbrúdleyp.

Í dag, 22. des. kl. 17.30 giftast í Norðskála kirkju Anna Joensen og Sámal Ev Debes, bæði av Oyri.

Vælkomst verður í Eydnuni á Oyrarbakka í kvøld kl. 20.00, har bæði brúdleypini verða hildin saman.


*Kundum og viðskiftafólki okkara verður ynskt eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri tað farna*

HJÁ GUNLEIVI

Um jólini hava handlar okkara opið soleiðis:

| | Við Gripsvegin | Við Landavegin |
|---|---|---|
| 22/12 | kl. 06.30-18.00 | kl. 07.00-23.00 |
| 23/12 | kl. 06.30-20.00 | kl. 07.00-23.00 |
| 24/12 | STONGT | STONGT |
| 25/12 | STONGT | STONGT |
| 26/12 | STONGT | STONGT |
| 27/12 | kl. 07.00-18.00 | kl. 07.00-23.00 |

Altíð bestu góðsku
Frá GUNLEIVI -tað smakkar